## Gregersen aftur til Skála



Bogi Gregersen er nú aftur knýttur at hópinum hjá Skála. Tað skrivar heimasíðan hjá B68. Bogi Gregersen skifti undan hesum kappingarárinum til B68. Hann hevur verið nógv darvaður av skaðum, og hann hevur havt trupult at vunnið sær pláss í byrjunaruppstillingini. Tí hevur framherjin gjørt av at venda aftur til Skála, sum er á næstaftasta plássinum í 1. deild í løtuni.

## Rubeksen vísir KÍ aftur

Thomas Hans Rubeksen, sum hevur royndarvant í Klaksvík seinastu vikurnar, var ikki sinnaður at skriva sáttmála við KÍ. Tað skrivar fjepparasíðan blaabylgjan.com. Sambært heimasíðuni hevur framherjin fingið tilboð um sama sáttmála, sum er galdandi fyri allar leikararnar í hópinum. Thomas Hans Rubeksen tók ikki av, tí hann hevur fingið tilboð frá øðrum føroyskum felag, sum eftir øllum at døma er meira áhugavert.

# Fleiri steypadystir á ólavsøku

**Ikki færri enn tveir steypadystir vera við vissu á ovara vølli í Gundadali í Havn á ólavsøku**

FÓTBÓLTUR

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Nú tað er ivasamt, um finalan í kappingini um løgmanssteypið verður spæld á ovara vølli í Gundadali í Havn ólavsøkudag sum ætlað, boða onnur feløg frá, at tey ætla at spæla steypadystir á ólavsøku.

### FF Giza og Undri

Tað er gamla fótbóltsfelagið hjá nólsoyingum, NÍF, sum nú eitur FF Giza, ið hevur bjóðað Undrinum av í steypadysti 27. juli. Vinnarin fær eitt meturhøgt steyp, ið vigar fleiri kilo.

Orsøkin til navnaskiftið er, at eingin nólsoyingur spældi í felagnum longur. Nýggja navnið er eftir staðnum har pyramidurnar liggja í Egyptalandi.

### HB og B36 spæla eisini

Hin steypadysturin verður slagið um Havnina, ið heimasíðan hjá HB kallar dystin. Tað eru tey bæði Vodafoneliðini hjá HB og B36, sum skulu dystast. Hesin dystur verður spældur ólavsøkuaftan klokkan seks.

Men tá bæði HB og B36 hava dystir á skránni 26. juli og aftur longu 2. august, verða uttan iva fleiri leikarar spardir í hesum dysti.



**HB og B36 hittast í steypadysti ólavsøkuaftan. 27 juli spæla FF Giza og Undri**
Mynd: Jens Kr. Vang

# Svimja um Nólsoyarfjørð á Ovastevnu



**Sum vant verður svomið um Nólsoyarfjørð annað vikuskiftið eftir ólavsøku. Hetta fyri at stuðla einum svimjihyli í Nólsoy**

SVIMJING

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Hetta er 12. árið á rað at skipað verður fyri stuðulssvimjing úr Havn til Nólsoy, har endamálið er at savna inn pening til ein svimjihyl í Nólsoy. Í mun til undanfarin ár, er kappingin í ár nakað øðrvísi enn vanligt.

Vanligi teinurin á 4000 metrar verður sjálvsagt. Luttakararnir leypa á bláman yviri við Strond við Stóradam og málið er heiðursportrið á keiini í Nólsoy. Hinir teinurin telur 1000 metrar. Luttakararnir her leypa á sjógv frá einum báti, sum liggur út fyri bygdina, og síðani verður svomið inn har málið er tað sama, sum hjá teimum, ið svimja 4000 metrar. Er tað soleiðis, at svimjarin kemur á land aðrastaðni, er neyðugt hjá teimum at renna síðsta strekkið til heiðursportrið.

Fyrireikararnir siga, at samarittar eru við ferðini um fjørðin, og at nólsoyingar taka í móti og hjálpa svimjarunum, tá koið er upp á land har.

**Eisini í ár verður svomið um Nólsoyarfjørð á Ovastevnu**
Savnsmynd

# 1. deild tjóvstartaði

**TB vann sannførandi á Víkingi, tá hesi bæði liðini settu hol á 16. umfar í 1. deild í gjárkvøldið**

FÓTBÓLTUR

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

TB vann dystin ruddiliga 4-1. Hinir fýra dystirnir í 16. umfari í 1. deild verða spældir leygardagin 25. juli. Tað var Dánjal Lervig, ið legði Víking á odda 1-0, men áðrenn komið varð til steðgin, hevði TB gjørt trý mál. Josef Bassene gjørdi tey bæði fyrstu, so økti Gilli Sørensen áðrenn Hanus Mortensen staðfesti sigurin og úrslitið gjørdist 4-1 til TB. Við sigrinum liggur TB á triðja plássi í 1. deild við 28 stigum. Sama stigatal hava HB og VB/Sumba, ið tó hava betri málúrtøku, og nú eisini ein dyst færri enn TB. Fremst er B71 við 30 stigum.